## Drupu 500.000 muslimar

Ein kambodiskur rithøvundur vil í einari nýggjari bók vera við, at stýrið hjá teimum reyðu khmerunum í Kambodja beindi fyri næstan 500.000 muslimum í árunum frá 1975 til 1979.

Hetta er væl meiri enn higartil hildið. Í fleiri ár hava fólk hildið, at reyðu khmerarnir beindu fyri umleið 75.000 muslimum tey fýra árini, teir ráddu í Kambodja. Rithøvundurin skrivar, at tá khmerarnir tóku valdið, vóru umleið 700.000 muslimar í Kambodja, men at fýra ár seinni vóru bert umleið 200.000 eftir.

Kanningar hjá ST hava avdúkað, at umleið 1,7 millión fólk lótu lív í Kambodja, tá khmerarnir høvdu valdið. Nógv doyðu í hungri, men nógv hundraðtúsund vórðu fyribeind.

## Spreingievni í bilunum

Trý fólk doyðu í einari ferðsluvanlukku á motorvegnum millum Gøteborg og Malmø gjáranáttina, ein norðmaður og tveir kekkar, og tvey fólk vórðu flutt á sjúkrahús. Fimm bilar vóru uppi í vanlukkuni, og allir vóru norskir.

Men tá svenska løgreglan fór at kanna bilarnar, sum vóru uppi í ferðsluvanlukkuni, vísti tað seg, at í einum av bilinum lá ein sonevnd molotov-bumba. Beint eftir vanlukkuna kom ein norskur bilur afturat á vanlukkustaðið. Løgreglan steðgaði bilinum og í viðførisrúminum funnu løgreglumenninir ein kassa við spreingievni.

Svenska løgreglan segði í gjár, at teir norsku bilarnir vóru á veg til Keypmannahavnar, men hvat fólkini skuldu gera við spreingievnið, hevði løgreglan ikki fingið at vita enn.

## Roynir aftur

Fyrverandi forsetin í Peru, Alberto Fujimori, sum síðani eina gølu um svik hevur búð í útlegd í Japan, sigur nú, at hann ætlar at stilla upp til forsetavalið í Peru um fýra ár.

Við eitt blað í Tokyo sigur Fujimori, at hann ætlar at stilla auppaftur, so hann kann hjálpa teimum fátæku í Peru. Sjálvur ivast hann ikki í, at hann fer at fáa stuðul frá nógvum veljarum. Annars vísti ein veljaraðkanning fyri stuttum, at 14 prosent av veljarun um høvdu atkvøtt fyri Fujimori, stillar hann upp. Sitandi forsetin, Alan Garcia, hevði fingið 40 prosent av atkvøðunum.

Alberto Fujimori, sum er av japanskari ætt, flýddi úr Peru til Japan og segði seg úr forsetaembætinum í november í 2000, eftir at myndugleikarnir høvdu avdúkað, at hann hevði verið uppi í einari muturgølu saman við ovastanum fyri landsins fregnartænastu, Vladimiro Montesinos.

## Fyrsta morðið í 150 ár

Tey 188 fólkini á avstralsku oynni Norfolk Island eru skelkað, tí fyri fyrstu ferð í 150 ár hevur eitt morð verið á oynni.

Norfolk Island ber orð fyri at vera eitt sera friðarligt samfelag, men nú hava teir tríggir løgreglumenninir á oynni biðið um hjálp, eftir at ein 29 ára gamal maður varð funnin myrdur herfyri.

Norfolk Island er 24 ferkilometrar til støddar og er einar 900 fjórðingar eystur úr Sidney. Til 1855 plagdu onglendingar at senda brotsmenn út á oynna at sita.

# Miðevropa druknar



*Illveðrið seinastu dagarnar hevur rakt syðra part av Russlandi serliga meint. Hendan myndin er frá russisku svartahavsstrondini*

**Gloprarregn noyddi myndugleikarnar í Eysturríki at lýsa ein pandspart sum vanlukkuøki, og í Praha máttu 50.000 fólk flytast burtur, tí ein partur av miðbýnum stóð undir í vatni**

ILLVEÐUR
*Árni Joensen:*

Vísindafólk tykjast vera á einum máli um, at tað er veðurhugtakið El Nino, sum er orsøkin til, at stór øki í Miðevropa og Suðurrusslandi standa undir í vatni eftir áhaldandi glopraregn. Fleiri hundrað fólk eru deyð í Evropa og Asia seinastu dagarnar, og við russisku svartahavsstrondina eru meiri enn 300 fólk ikki komin afturíaftur.

Mánadagin regnaði tað so illa í landspartinum Salburgerland í Eysturríki, at myndugleikarnir kendu seg noyddar at lýsa økið vanlukkuøki. Brúgvarnar í býnum Salzburg máttu steingjast, og nógvastaðni stóðu vegir og jarnbreytir undir í vatni og runu. Skipaferðslan eftir Donau varð steðgað, og meiri enn 6.000 hermenn máttu boðsendast at hjálpa fólki.

Í Italia hava landbúnaðarfelagsskapirnir roknað seg fram til, at illveðrið teir seinastu dagarnar hevur kostað bøndrunum meiri enn 25 milliardir krónur. Áhaldandi regn hevur oyðilagt nógvar vínmarkir, og stór landbúnaðarøki standa undir í vatni.

Úr Týsklandi verður sagt, at har hava tvey fólk latið lív í illveðrinum. Fleiri býir har suðuri í landinum hava staðið undir í vatni, og í Bayern máttu myndugleikarnir steingja ein av teimum týdningarmestu vegunum.

Í Kekkia hevur tað regnað so illa, at gjáranáttina var ikki framkomandi nógvastaðni í Praha. Býarmyndugleikarnir høvdu boðað frá, at ein stórur partur av miðbýnum fór at standa undir í vatni, og 50.000 fólk fingu boð um at fara úr økinum. Sunnudagin doyðu seks fólk í illveðrinum í Kekkia.

Har suðuri í Russlandi hevur illveðrið gjørt serliga stóran skaða. Minst 58 fólk eru funnin deyð, men meiri enn 300 eru ikki komin afturíaftur eftir vatnflóð, flóðaldu og skriðulop við Svartahavið. Myndugleikarnir bera ótta fyri umfarssjúkuum og hava givið boð um at koppseta fólk ímóti tyfus.

Eisini í Danmark hevur tað regnað illa seinastu dagarnar, serliga á Sælandi, Lollandi, Falster og í norðara parti av Jyllandi. Nógvir kjallarar hava staðið undir í vatni, og í Silkeborg fingu seks fólk skaða, tá tá ein presenning yvir einum tónleikapalli hoyknaði undan tí nógva regninum.

# Bera ótta fyri álopum á kendar brýr

**Amerikansku myndugleikarnir hava seinastu dagarnar fingið ábendingar um, at yvirgangsmenn ætla at søkja at kendum brúm so sum Brooklyn Bridge í New York og Golden Gate Bridge í San Fransisco**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Blaðið New York Times skrivaði í gjár, at myndugleikarnir hava fingið upplýsingarnar frá einari útlendskari stjórn, men einki varð sagt um, hvørja stjórn talan er um.

Ein talsmaður fyri samveldisløgregluna FBI segði við blaðið, at talan er um álop á fleiri mál í USA, og at tær kendu brýrnar eru millum teirra. Sambært talsmanninum hevur tann útlendska stjórnin fingið upplýsingarnar frá einari keldu, sum fyrr hevur víst seg at vera ógvuliga álítandi.

Seinasta vikuskiftið varð vaktarhaldið við Golden Gate Bridge í San Fransisco styrkt munandi, men sambært løgregluni í býnum hevði tað ikki samband við ta nýggju hóttanina. At vaktarhaldið varð styrkt komst av, at onkur hevði boðað løgregluni frá, at yvirgangsmenn ætlaðu at stoyta eitt hernaðarflogfar ímóti brúnni. Einki hendi kortini.

Mánadagin valdu myndugleikarnir í New York at styrkja vaktarhaldið við Brooklyn Bridge og aðrar brýr um ánna East River.

Eygleiðarar í USA halda, at upplýsingarnar um ætlaðar yvirgangsatsóknir stava frá tí tikna Abu Zubaydah, sum fyrr skal hava avdúkað álopsætlanir hjá felagsskapinum al-Qaeda. Abu Zubaydah var ein av næstu ráðgevunum hjá Osama bin Laden, men varð tikin í Pakistan í vár.



# Tápuligt at gifta seg undir verandi forsorgarlóg

LÓGARSMÍÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Stórur munur er á hvussu gávumild forsorgarlógin er fyri gift og ógift foreldur*

Verandi forsorgarlóg eggjar ikki fólki at giftast, heldur hinvegin. Tað vildi verið beinleiðis tápuligt at gift seg, hyggja vit eftir hvussu góðar treytir forsorgarlógin gevur ógiftum í mun til tey giftu. Talan er um ein grovan mannamun og lesa vit forsorgarlógina, so er ilt at síggja hví fólk skulu gifta seg í hvussu er áðrenn børnini eru vaksin

Tað er grein 2 í forsorgarlógini sum ger allan munin. Hon sigur, at ein hvør hjúnarfelagið hevur uppihaldsskyldu mótvegis hjúnarfelagnum, og tað vil siga, at áðrenn forsorgarlógin kann koma eini hjúnum til hjálpar, so skulu allar peningagoymslur verða tømdar.

Ørvísi er við teimum ógiftu, sum búgva saman. Her er einki dýnulyftarí um hvussu múgvandi fólk eru. Annar felagin í í ógifta paralagnum kann vinna milliónir um árið, meðan hin fær felagið kann ganga heima og ansa eftir børnunum, meðan hann fær kontanthjálp og sínar útreiðslur í parforholdinum goldnar frá tí almenna av skattgjaldarans krónum. Tað vil siga, at tað almenna kann rinda helvtina av SEV og oljurokningini hjá einum ógiftum pari, har annar felagin kann hava eina milliónaintøku, eitt nú ein vinnulívsmaður, ein stjóri ella ein skipari.

Grein níggju stykkið fýra í forsorgarlógini gevur vælbjargaðum ógiftum veldugar møguleikar at njóta almennar pengar, gera kommununar eitt nú ikki sína skyldu og bjóða hesum ansingarmøguleikar fyri børnunum. Spurningurin um moral nýtist slett ikki at koma upp at venda, tí lógin er so galant, at fólk sum slett ikki hava tørv á forsorgarhjálp, kunnu fáa hesa fullkomiliga lógliga bara tey eru »grádig« ella rættari gromm nokk.

Grein níggju stykkið fýra sigur: »Ydelse af hjælp forudsætter, at såvel den, der søger hjælpen, som ægtefællen i tilstrækkeligt grad har udnyttet sine arbejdsmuligheder. Dette kn f.eks. anses for godtgjort, når en forsørger ikke kan påtage sig indtægtsgivende arbejde på grund af pasning af børn og kommunalbestyrelsen ikke kan henvise anden pasningsmulighed«

Er talan um gift her, so verður bara peningur útgoldin, so verður einki útgoldið eiga tey á bók, ella um annar hevur arbeiði. Er talan um ógift, so kann annar ganga heima og hin kann vinna óavmarkaðar nøgdir av peningi, uttan at hetta gongur útyvir almennu veitingina.

## Firtin almannaráðharri



*Páll á Reynatúgvu*

LÓGARSMÍÐ
*Jústinus L. Eidesgaard*

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa nýggja landsstýrismannin í almannamálum Páll á Reynatúgvu at gera nakra viðmerking til málið um mismunin millum gift og ógift í forsorgarlógini. Ikki tí hann hevur eina meining um málið, men hann vil ikki úttala seg til Sosialin, tí hann er firtin inn á blaðið. Orsøkin er ein grein, sum kom í blaðið valdagin. Í greinini verður ført fram, at ein komandi ítróttarhøll á Sandi varð nýtt sum valagn.

## Øll eiga at vera líka



*Kristian Magnussen, tingmaður*

LÓGARSMÍÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Kristian Magnussen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin sigur, at tíðin er komin at broyta forsorgarlógina og hann veit hvat hann tosar um. Umframt at vera løgtingsmaður, so er Kristian Magnussen sosialráðgevi og forsorgarlógin hevur í mong ár verið eitt av hansara høvuðs arbeiðsamboðum.

Forsorgarlógin er ein gomul lóg og tá hon varð gjørd fyrstu ferð í 1967 vóru nógv fleiri fólk gift enn í dag. Tá var lógin meira rættvís enn hon er nú. Hon er so broytt nakrar ferðir, fyrst í 1977 síðan í 1983 og aftur í 1987 og seinast í 2000.

– Eg haldi, at grein 2 í lógini sum gevur hjúnum uppihaldsskyldu mótvegis hvørjum øðrum eigur at strikast. Á hendan hatt gerast allir borgarar í landinum líka. Eg veit væl, at hetta kemur at føra nakrar eykaútreiðslur við sær, men eg dugi ikki at síggja at tað kann gerast ørvísi. Í dag ber ikki til hjá myndugleikunum at fara undir miðvíst dýunulyftarí at vita hvør svevur hjá hvørjum øðrum. Vit koma ikki trupulleikanum til lívs fyrr enn vit geva øllum borgarum somu treytir, gift ella ikki, sigur Kristian Magnussen.

– Leggur samgongan ikki fram eitt uppskot um at broyta forsorgarlógina soleiðis at øll verða javntstillað, so fari eg sjálvur at leggja eitt slíkt uppskot fyri tingið í næstum, sigur Kristian Magnussen, tingmaður.

## So órættvíst



*Jenis av Rana*

LÓGARSMÍÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Jenis av Rana, formaður Miðflokksins setir broyting av forsorgarlógini sum eitt av aðalmálunum hjá nýggju samgonguni.

– Vit kravdu ikki familjumálaráðharran fyri at sita hendur í favn og hendan lógin má broytast, tí tað eru mong, sum ikki kunnu liva samam ógift av reint moralskum grundum. Fyri hesi er tað ógvuliga órættvíst at hava eina forsorgarlóg, sum ger so stóran mun á giftum og ógiftum, sigur Jenis av Rana.

– Vit fara í samgonguni at gera eina heilt nýggja sosiallóggávu og tá skal hesin órættur fáast av vegnum. Vit fara at arbeiða hart í samgonguni fyri at fáa trupulleikan upp á pláss, sigur Jenis av Rana.

## Rokni við broytingum



*Rúni Hentze*

LÓGARSMÍÐ
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Rúni Hentze, skipari úr Skopun, sum hevur tikið sæti á tingi fyri Páll á Reynatúgvu, sum nú er landsstýrismaður í almannamálum, sigur at arbeitt verður í samgonguni við at broyta forsorgarlógina.

– Hetta málið hevur týdning og vit kunnu rokna við at broytingar koma, annars eru vit ikki komnir langt enn, sigur Rúni Hentze í stuttari viðmerking.